# Er snúður komin í telefonkáplarnar hjá Sigmari?

TÓRBJØRN JACOBSEN



Nú skuldi tað vísa seg, at Høgni Hoydal gjørdist nærum profetiskur, táið hann, í einum tíðindakuti í sjónvarpinum, sum varð upptikið seinrapartin týsdagin, helt fyri, at tað tókiskt sum øll samfelagsskipanin hevði koppað sær á, nú tá ið politikarar vóru farnir at tosa sum embætismenn, og embætismenninir bráðliga vóru farnir at tosa sum politikarar. Hann hugsaði ivaleyst um dalandi visiónsballónina uppi á Hotel Føroyum, har løgmaður leitar eftir einum lykli, sum kann laga tað soleiðis, at Føroyar skjótast gjørligt koma at flyta seg frá "filétfabrik til idéfabrik". Hetta flotta hugtakið, sum onkur nálastríputur yuppie-spinnari við loðnum lógvum hevur lagt sosialdemokratiska oddvitanum í munnin, og sum hann ivaleyst av óvart er farin at mutla fram fyri seg, táið hann so av og á roynir at progressivera seg sjálvan á visiónstorginum og tómu løturnar treingja til eitt kick.

Spádómurin, ella uppáhaldið, varð sementerað sum beiskur veruleiki í tíðindasendingini hjá útvarpinum hetta sama kvøldið.

Eftirskotríðurnar frámagnfulla, eleganta og kontanta hugsjónarmanninum á fiskivinnupolitiska økinum, Alfredi Olsen, og skuggalandsstýrismanninum og veruliga makthavaranum í fiskivinnumálum, Jørgeni Niclasen, valdi Hjalti í Jákupsstovu at flyta ein framúr góðan, fyri ikki at siga snildan, leik, sum í fyrsta lagi hevur havt tað við sær, at landsstýrismaðurin av navni, Bjørn Kalsø, stóð púra massfoss, og visti hvørki út ella inn, táið hann varð spurdur, hvat hann ætlaði sær at gera við málið, nú stovnurin sjálvboðin var farin í offensivin og bað um at verða gradaður og kannaður úr høvdi í reyv.

Um Sigmar Bláberg gongur við einum bipparа uppi á sær, sum Fólkaflokkurin hevur figgjað og latið honum, tað veit onkur, men ongin sum ferðast í politisku skipanini ivast í at Jørgen, sum ikki einaferð, hevði lagt eitt gott orð inn fyri seg sjálvan, nú hann fór avstað við dastinum av tíðindasendingini. Trupulleikin hjá lurtaranum var bara, at hann tosaði sum vísundamaður, um hvussu toskastovnurin hevur háttað sær í gjøgnum eina heila øld, og um hvussu lívfrøðiligu útlitini vóru frameftir. Og so fýrdi hann alla svaduna hjá Jón Kristjánssyni av, einaferð afturat. Mikrofonhaldarin mundi halda væl til standa, kyndi undir bálið, og so hevði hann leverað teir minuttirnar, sum eru hansara dagsins gerningur í hesi alment goldnu public service rásini.

Fyri tað um Jørgen Niclasen gongur runt og heldur seg vera ein autodidaktan fiskifrøðing, við íslendska kóvboybiologinum sum skjaldsveini, so eigur ein almenn rás at vera somikið at sær komin, við kompetentum starvsfólki, at slíkt humbukk ikki eigur at koma nær í námindi av eini studiomikrofon.

Tíðindakutið um toskastovnin snúði seg eittans um standin hjá føroyska toskastovninum, um biologisku viðurskiftini, og spurningarnir vóru av slíkum slagi, at tað hevði verið heilt sjálvsagt, at Hjalti ella ein av hansara sveinum svaraðu teimum. Sferan var faklig og als ikki politisk.

Sjálvur sat eg eftir við spurninginum, um snúður mundi vera komin í telefonkáplarnar hjá Sigmari, ella um Jørgen stendur so frammarlaga í teleskrá hansara, at hann av misgávum er komin at ringja til skeiva adressu í allari ferðini, sum oftani eyðkennir tíðindastovurnar stutt fyri lokafreistina. Men, tá ið hetta eftirhondini er vorðið reglan heldur enn undantakið, er niðurstøðan, at almenna public service rásin raðfestir vísundastøðið hjá Jørgeni væl hægri enn tað hjá Hjalta. Tá er ongin orsøk til at kanna Fiskirannsóknarstovuna, sum Hjalti sjálvur hevur skotið upp. Tá er líka frægt at leggja hana niður alt fyri eitt og fáa staðfest endaliga í politisku skipanini, at Jørgen og Fólkaflokkurin er føroyski vísundastovnurin, tá ið tað ræður um fiskastovnar og fiskifrøði og hartil alt granskingarhøpið, ið hevur hingið uppi við hesum framkomna stovni, síðani hann varð skipaður og fór at virka í føroyskum regi.

Sum sagt, annaðhvørt er snúður komin í telefonkáplarnar hjá Sigmari Bláberg, ella er hann vorðin forvirraður av hasum bipparanum, sum Jørgen hevur lagt niður í fikku hansara, ella mega Jógvan Jespersen, Jógvan Arge og Jóhann Mortensen í triðja lagi koma upp úr sínum djúpu vaggingarstólum og siga okkum, um hetta er politikkurin hjá Kringvarpinum. Teir hava fingið eitt mandat og eina ábyrgd á hesum almenna stovni, sum skal eitast at vera objektivur, og sum føroyingar gjalda tíggjutals milliónir fyri um árið, ið krevur, at teir megna at halda so á leið skil á, hvat ið verður varpað út um allar geilar.

Heldur hetta lagið fram skal man so rokna við, at Kári P. Højgaard skal spyrjast um, hvussu undirsjóvar linjuføringin skal vera ímillum Streymoynna og Sandoynna, at Andrias Petersen fer at vera spurdur um, hvussu hann heldur at komandi vetnismotorurin umborð í nýggju Nólsoyarferjuni skal deseinast ella at Olav Enemoto skal spyrjast um, hvussu ein kúgv í onkrum fjósi í landinum skal kurerast fyri tað mesta heldur seg til so illani veitt við?

Latið okkum koma aftur á slóðina, har ið skómakarin fyri tað mesta heldur seg til sín leist. Har embætismenn, frøðingar og politikarar tosa um tað, sum teir áttu at havt skil fyri. Gongur spádómurin hjá Høgna út, endar alt í einum hurlivasa, í einum ruðuleika, tí hava allar góðar kreftir skyldu til at rudda upp í hesum eskalerandi óskili. Fyri tað um visiónsballónin hjá løgmanni er somikið tódnað, at hon lendir á jørðini hvørja løtu, er ongin orsøk til, at hesin fyrr so stolti stovnur í framsøkn, hugsi í hesum føri um Útvarp Føroya, neyðlendur av berum ósketni og gerst ein bági fyri samfelagið. Hetta er ikki skrivað av obsternasigum illvilja, men er eittans ætlað sum eini vælmeint ráð til teirra, ið hava eftirlitið við meskavíddunum í almennu public service rásunum og sum hava skyldu til at tryggja fólkinum ein so væl kvalifiseraðan og objektivan tíðindaflutning sum yvirhøvur til ber.

# Fremmand djóra- og plantusløg hótta náttúruna

JANUS HANSEN
lívfrøðingur



**Myndugleikin metir ikki vandan vera stóran**

Í útvarpinum á morgni 2. august hoyrdu vit Jens-Kjeld Jensen í Nólsoy greiða frá innfluttum djóra- og plantusløgum, og hann nevndi, hvussu skaðilig avleiðingin av teimum kundi vera. Seinni á degnum endurgav ein útvarpskvinna eina samrøðu við avvarðandi myndugleika, landsdjóralæknan Bjørn Harlou, um hetta sama mál. Hann var ikki samdur í døpru spádómunum, tí hann metti, at fremmand sløg høvdu ring lívskor her.

Tað er syndarligt at hoyra útsagnir, sum eru so út av lagi skeivar, í einum almennum fjølmiðli, men heilt átaluvert verður tað, tá ið tað er avvarðandi almenni myndugleikin, sum kemur við teimum.

Um Bjørn Harlou hevði givið sær far um støðuna, hevði hann varnast, at hon longu nú er avbæra ring. Tað krevst als eingin serfrøði til at síggja tað. Vit vita øll, at reyðmaðkar hvørva kring landið orsakað av, at stóri flatmaðkurin, ið er innsløddur, ger seg inn á teir. Nógvastaðni hava fólk stórar trupulleikar av morsniglinum, ið eisini er innsløddur. Síðan rottan varð innsløddd til Føroya, hevur hon verið orsøk til, at fleiri milliónir av pisum ikki eru komnar undan. Hetta eru trý dømi av fleiri enn hundrað.

**Fremmand sløg klára seg væl**

Tað er einki nýtt í, at flestu fremmandu djóra- og plantusløgini, sum sløðast inn, hava ring lívskor á nýggja staðnum, men samstundis eru tað nøkur, sum hava góð lívskor. Nógv spælir inn her. Fyri tað fyrsta, so finnur fremmanda slagið ofta lívd hjá okkum menniskjum, inntil stovnurin hevur ment seg so mikið, at slagið kann spjaða seg út í náttúruna. Ein annar fyrimunur fyri fremmanda slagið er, at náttúran á oyggjum ikki er tillagað at standa ímóti fremmandum sløgum og tí er meira viðbrekin.

Ein tummilsregla sigur, at eitt av 10 innsløddum djóra- og plantusløgum megnar at liva á nýggja staðnum, og at eitt av 10 sløgum, sum megna at liva, kemur so mikið væl fyri seg, at tað er til skaða fyri náttúruna á staðnum. Sostatt kunnu vit siga, at fyri hvørt skaðaelvandi fremmant slag eru 100 onnur innslødd. Tá vit síðstu árini hava sæð fleiri nýggj fremmand sløg, sum eru til skaða, so kunnu vit rokna við, at fleiri hundrað ella fleiri túsund sløg eru komin til landið hetta tíðarskeiðið.

Um Bjørn Harlou hevði hugt at, hvaðan hesi fremmandu djóra- og plantusløg koma, so hevði hann varnast, at tað eru sløg úr øllum heiminum. Tak eitt nú sløgini, sum eg nevndi frammanundan: stóri flatmaðkurin er úr Ný Sælandi, rottan úr Kina og morsnigilin úr Spania. Og vit kunnu halda áfram: húsvættið brúna úr Norðuramerika, silvurfiskur úr Miðeystri, músin úr Afrika, avstralsk tjóvaklukka úr Avstralia o.s.fr.

**Løgtingið ásannar trupulleikan**

Løgtingið hevur ásannað trupulleikan og hevur góðtikið fleiri altjóða sáttmálar, sum áleggja okkum at fyribyrgja, at nýggj sløg sløðast inn. Í einum sáttmála, sum løgtingið hevur góðtikið, stendur, at vit skulu: "... prevent the introduction of, control or eradicate those alien species which threaten ecosystems, habitats or species".

Á føroyskum (egin týðing): "... fyribyrgja innflutningi av, fáa tamarhald á ella oyða tey fremmandu sløgini, sum hótta vistskipanir, búøki ella sløg".

Eitt stig á leiðini er kunngerðin um innflutning av eksotiskum djórum: "Ikki er loyvt at innflyta eksotisk dýr til Føroya". Helst sipar henda kunngerðin til tilvitaðan og ótilvitaðan innflutning við fólki, men mær vitandi verður einans havd umsjón við tilvitaðum flutningi, har fólk sjálvi spyrja um loyvi. Tó, tað má sigast vera høpisleyst, at lógir og kunngerðir verða gjørdar, sum tryggja, at djóra- og plantusløg ikki verða innflutt við vilja, samstundis sum einki verður gjørt fyri at tryggja, at hesi somu sløg ikki tilvildarliga koma við farmi og ferðafólki.

**Avleiðingarnar sera kostnaðarmiklar**

Tað er ikki til at siga frammanundan, men trupulleikin, sum kann standast av hvørjum einstakum fremmandum slagi, kann vera sera stórur. Í USA varð ein røð av innsløddum sløgum kannað, og tað vísti seg, at hesi sløg kostaðu samfelagnum yvir 700 milliardir krónur um árið.

Kostnaðurin kann finnast allastaðni í samfelagnum. Í Týsklandi hevur tað verið víst á, at ein innslødd planta er orsøk til, at ein lítil partur av fólkinum fær astma ella hoyfepur. Hesin lítli parturin kostar týska samfelagnum úti við 100 milliónir krónur um árið.

Hóast vit ikki duga at síggja eina beinleiðis avleiðing av einum innsløddum slagi, so er tað als eingin orsøk til at halda, at als eingin avleiðing er.

Tað tykist, sum um landsstýrið metir, at peningaligi kostnaðurin umframt menniskjaliga og samfelagsliga byrðan er lættari at bera enn kostnaðurin av fyribyrging og oyðing av innsløddum djóra- og plantusløgum. Sjálvsagt er tað ikki so.

Global Invasive Species Programme (GISP), er tann størsta altjóða verkætlanin, sum snýr seg um innslødd sløg. GISP vísir á, at "Prevention of introductions is the [...] most cost-effective option. This lesson has been learned the hard way from several cases of highly destructive and costly invasive organisms".

Her verður sagt, at ein dýrt vunnin lærdómur er, at tað loysir seg best peningaliga at fyribyrgja innsløðing av fremmandum sløgum.

**Myndugleikin má ásanna trupulleikan**

Tíverri kann staðfestast, at lítið og einki verður gjørt fyri at forða fremmandum djóra- og plantusløgum í at koma til landið, og einki verður gjørt fyri at forða teimum í at koma fyri seg og breiða seg.

Áheitanin til Føroya landsstýri og landsdjóralæknan má fyrst og fremst vera um at taka trupulleikan í álvara. Harnæst er neyðugt at fáa sær eitt yvirlit yvir, hvussu stórur trupulleikin er og kunna um hetta og kunna um vandan. Síðani er neyðugt at kanna bæði fólk og farm, sum koma til landið – hetta kann gerast við at økja um virksemið hjá tolleftirlitinum.